*Hvítusunnudagur kl. 11.00:*

## Guðstænasta í Fuglafjarðar kirkju

Hvítunnudag eru liðin 20 ár síðani Fuglafjarðar kirkja varð vígd, og í tí sambandi verður hátíðarguðstænastu í kirkjuni, har Uni Næs, prestur, prædikar og Fuglafjarðar Sangkór syngur.

*Hvítusunnudagur kl. 14.15*

## Aftur á gomlu torvheiðarnar

Í tveimum sendingum fara feðgarnir Heri og Jónheðin Tróndheim út á gomlu torvheiðarnar á Vatnhamri í Leirvík. Heri fer at greiða frá, hvussu familjan í Leirvík livdi sítt lív við neytum og torvi. Í fyrru sendingini verður hugt eftir tí gomlu geilini, sum neytini vóru rikin í hagan ígjøgnum og sum enn sæst væl í bønum, Á veg út á torvheiðarnar verður prátað um toftirnar av revagarðinum og fransagravirnar.

*Hvítusunnudagur kl. 15.00*

## Hornorkesturstevna í Vestmanna

Í tveimum sendingum hvítusunnudag fer útvarpið at senda frá Hornorkesturstevnuni, sum í ár var hildin í Vestmanna. Í sendingunum verða øll tey orkestur, sum vóru á stevnuni, at hoyra.

*Hvítusunnudagur kl. 15.45*

## Funnu kinesararnir Amerika

Tað vakti stóran ans fyri tveimum árum síðani, tá fyrrverandi bretski herflotayvirmaðurin Gavin Menzies gav út eina bók, har hann vildi vera, at tað var ikki Kristoffur Kolumbus, sum fann Amerika, og at Ferdinand Maggelan var ikki tann fyrsti, sum sigldi runt jørðina. Gavin Menzies vil vera við, at kinesarar vóru teir fyrstu, sum sigldu kring knøttin, og at tað eisini vóru teir, sum funnu Amerika, 70 ár undan teirri kendu ferðini hjá Kolumbusi.

*Hvítusunnudagur kl. 19.00*

## Arnhild og Eystein

Hendan føroyska operan var fyrstu ferð framførd í útvarpinum á páskum. Willy Kastborg hevur skrivað tekstin og Kristian Blak tónleikin. Norski upprunateksturin hevur Dánjal Hoydal týtt til føroyskt.

Søgan er um tvær familjur, sum fylgjast ígjøgnum trý tíðarskeið av Føroya søgu. 1. akt er frá víkingatíðini, tá kristindómurin verður boðaður í Føroyum. Onnur akt er frá einahandilstíðini undir Gabla-tíðini, og triðja akt er úr nútíðini við stríðnum um loysing ella samband. Men hóast tvídrátt millum familjurnar av polittiskum ella átrúnaðarligum orsøkum, so eydnast tað teimum ungu Arnhild og Eysteini at finna saman í kærleika og semju.

Høvuðsleiklutirnar í operuni syngja Eivør Pálsdóttir og tenorsangaranum Ernst Sondum Dalsgarð. Aðrir sangsolistar eru Fróði Sandoy og Herfinn Árnafjall. Orkestrið er samansett av seks tónleikarum, sum Kristian Blak stjórnar, og kórið, sum ímyndar fólkið, er Tarira, sum Sunleif Rasmussen stjórnar.

Arnhild og Eystein verður send aftur í útvarpinum hvítusunnukvøld.

*2. hvítusunnudagur kl. 14.15*

## Aftur á gomlu torvheiðarnar

Í seinnu sendingini við Hera Tróndheim um bygdarlív í Leirvík verður prátað um gomlu torvhúsini og um teigalendini. Her fer eisini at greiða frá, hvussu tey arbeiddu torvið.

*Týsdagur kl. 19.00*

## Føroyar–Holland

Fyri fyrstu ferð spæla Føroyar landsdyst í fótbólti móti Hollandi. Dysturin verður á olympiska leikvøllinum í sveitsiska býnum Lausanne, har europeiska fótbóltssambandið eisini hevur høvuðssæti. Dysturin er liður í fyrireikingunum hjá hollendingum til EM-kappingina í fótbólti, sum byrjar 12. juni. Hvørjar møguleikar vit hava móti teimum snildu hollendingunum er ikki gott at siga. Okkara landslið er ikki fullmannað, tí spælararnir í Íslandi noyddust at senda avboð.

*Hósdagur kl. 19.00*

## Hellan

Í bókini »Hellan«, sum er nýggj framhaldssøga í útvarpinum, lýsir svenski bispurin Bo Giertz fólk í eini svenskari sókn og tað, sum ræður um í mannalívinum. Vit hoyra um prestar og kirkjulið trý ymisk skifti og sanna, at tíðir skifta, men at instu spurningar lívsins eru teir somu: skuld og revsing, sannleiki og lygn, gudsótti og fals, hatur og fyrigeving, frelsa og glatan.

## KROSSORÐ




**Vinnari:**

*Jóhannes Henriksen*
*Undir Eyrgøtu*
*490 Strondum*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: SNÓRABEINUR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| S | J | E | Y | B | Í | B | Í | L | S | K | R | A | K | Á | R |
| K | A | R | L | | M | O | S | Í | | A | Í | R | B | U | S |
| R | R | | U | | | N | O | R | Ð | P | O | L | | M | W |
| A | A | | R | Ó | | | L | Í | | F | | Y | O | | |
| M | | Ø | | V | Í | T | A | | J | A | S | | R | N | A |
| B | Í | R | N | Í | | Ú | T | V | A | R | P | S | M | Á | L |
| L | N | | E | T | | N | Í | | K | V | | Á | S | L | A |
| A | Ð | A | L | U | S | | Ó | | K | E | | M | T | | B |
| M | Í | R | A | G | E | | N | E | Í | L | | A | U | L | A |
| E | A | N | | | R | T | | Ð | | | A | L | N | U | M |
| S | T | Ó | R | T | B | Í | N | G | O | | S | | G | M | A |
| T | Ú | R | A | T | A | L | | A | M | A | L | G | A | M | |
| 375 | R | A | V | | R | | A | R | A | F | A | T | | U | R |
| T | U | | A | B | A | C | U | S | | T | K | | B | R | Á |
| A | R | A | G | O | N | Í | T | | A | N | | P | O | | R |
| L | | B | E | R | | F | O | R | M | A | L | Í | S | M | A |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

**376**

**Loysunarorðið:** ..................

Navn: ........................

Bústaður: ...................

Bygd/býur: ...................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***



**FILMSTEIGURIN**

# The Day After Tomorrow

Klótan er hótt av alheims upphiting, sum hevur við sær eina røð av náttúruvanlukkum, og ein nýggj ístíð byrjar. Klimatologurin Jack Hall (Dennis Quaid), sum til onga nyttu hevur ávarað myndugleikarnar um tann stóra vandan, verður noyddur at seta lív og heilsu upp á spæl til tess at bjarga soninum Sam (Jake Gyllenhaal), sum býr í New York. Einasti trupulleikin er, at New York býur er raktur av vatnflóð, og býurin er frystur, nú ístíðin er byrja aftur.

Fleiri tekin høvdu verið um alheims broytingina í veðrinum: Kavi í New Delhi, alt oyðileggjandi ódnir á Hawaii, heglingur í Tokio til støddar við grapefruktir, og so framvegis. Men myndugleikarnir lurta ikki eftir Jack, fyrr enn tað er ov seint.





Samstundis sum umfatandi evakueringar verða fyrireikaðar sunnanfyri, so fer Jack norður til New York fyri at bjarga Sam. Men sjálvt garvaði Jack er ikki fyrireikaður upp á tað, sum er við at henda -- við honum, soninum, og teirra klótu.

Roland Emmerich hevur leikstjórnað THE DAY AFTER TOMORROW. Hann tók sær eisini av INDEPENDENCE DAY, sum gevur okkum eina ábending um, at THE DAY AFTER TOMORROW kundi verið ein filmur við høgari góðsku.




**Heimsfrumsýning**

Fríggjadagin 28.05. kl. $20^{15}$ — Fríggjadagin 28.05. kl. $23^{00}$
Leygardagin 29.05. kl. $20^{15}$ — Leygardagin 29.05. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 30.05. kl. $19^{45}$ — Sunnudagin 30.05. kl. $22^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 28.05. kl. $19^{30}$ — Fríggjadagin 28.05. kl. $22^{45}$
Leygardagin 29.05. kl. $19^{30}$ — Leygardagin 29.05. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 30.05. kl. $19^{00}$ — Sunnudagin 30.05. kl. $22^{15}$

**P BIO KIOSKIN P**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**




Fríggjadagin 28.05. kl. $17^{30}$ — Leygardagin 29.05. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 30.05. kl. $17^{00}$ — *– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning – Billettprísur: 70,- kr.**

Fríggjadagin 11.06. kl. $16^{30}$ — Fríggjadagin 11.06. kl. $19^{45}$
Fríggjadagin 11.06. kl. $23^{00}$ — Leygardagin 12.06. kl. $16^{30}$
Leygardagin 12.06. kl. $19^{45}$ — Leygardagin 12.06. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 13.06. kl. $16^{00}$ — Sunnudagin 13.06. kl. $19^{15}$
Sunnudagin 13.06. kl. $22^{30}$

**Forsølan byrjar týsdagin 01.06 kl. $14^{00}$**